## Eingin avgerð tikin enn um Alex Alves

Sambært Norðlýsinum, er eingin avgerð enn tikin um møguligan sáttmála við brasilska verjuleikaran, Alex Alves, sum í løtuni royndarvenur hjá KÍ. Curcic bíðar eftir at fáa pappírini upp á pláss. Brasilski verjuleikarin, Alex Alves, royndarvenur hjá KÍ í løtuni, har hann m.a. var við á liðnum, sum spældi ímóti NSÍ mánakvøldið. Hann er úr norðurpartinum av Brasilia, har hitastigini eru ógvuliga nógv, so sigast má, at hann er vanur við annað veðurlag enn tað, sum Føroyar hava at bjóða. Hetta er fyrstu ferð, at Alex er úr heimlandi sínum og roynir síni fótbóltsevni, so tað sigur seg sjálvt, at hann krevur at tillaga seg broyttu umstøðunum. Í venjingardystinu mánadagin royndi hann seg bæði sum miðverjuleikara og sum høgri bakkur, meðan hin brasiliumaðurin á liðnum, Rodrigo, spælir í álopinum.



# Sætta finalan hjá Mjølni

**Leygardagin um trýtíðina verður mannliga steypafinalan bríkslað í gongd í høllini á Hálsi í Havn, har Mjølnir og SÍ, framman fyri stórari áskoðarafjøld, skulu dystast um at gerast steypavinnarar anno 2008**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Besta mansliðið hjá Mjølni hevur fyrireika seg sum frægast í hesum seinastu døgunum undan stóra finaludegnum, sum má metast at vera størsti einstaki dagurin innan føroyskan flogbólt.

Serligi finaludagurin hevur verið hildin síðan í 2000, tá júst Mjølnir eisini spældu. Ta ferðina var mótstøðuliðið, Fleyr úr Havn, og hjá kvinnunum var talan um Drátt og Mjølnir. Í báðum dystunum vóru Klaksvíkingar við yvirlutan og vunnu steypið, so teir vita, hvussu Sørvingar munnu hava tað undan vikuskiftinum.

Leygardagin er so tíð til finalur aftur, har fyrst kvinnufinalan verður leikt kl. 13:30, og tá hon er avgreidd, fer mansfinalan í gongd, væntandi um trý-tíðina seinnapartin leygardagin.

### Brøðurnar í Mjølni

Tosar man um flogbólt í Føroyum, kemst ikki undan at nevna Eystein Elttør úr Mjølni. Eystein (uttan ð, blaðm.) hevur verið ein sera týdningarmikil leikari á Mjølnir liðnum, og hevur hann til uppgávu, at vera verjuleikari, ella libero, so hann hevur mangan staðið fyri skotum, og hann hevur verið sera tíðandi partur av góðu gongdini hjá Mjølnir, seinastu nógvu árini.

Men Eystein er ikki einsamallur í Elttør familjuni, ið hevur fingist við flogbóltsspælið. Lítlibeiggin, Rúni Elttør, ið kanska einamest er kendur innan fótbóltsheimin, var ein rættuliga góður flogbóltsleikari á ungum árum, og Eystein metir, at helt hann á at spæla, og ikki fór til skips á ungum alduri, hevði hann verið eitt stórt føroyskt flogbóltsnavn í dag. Eystein gleðist yvir at hava bróðurin við í hópinum, og teir siga seg báðar vera sera spentar til vikuskiftið.

### Elttør og Weihe

- Rúni er av sama árgangi sum Rúni Weihe, og tá vóru teir báðir nakað heilt serligt. Hevði lítlibeiggi hildið á, og verið seriøsur, so stóð hann onki aftanfyri Rúna Weihe, sigur Eystein um beiggja sín Rúna Elttør, ið verður við Mjølnirhópinum til finaluna.

Rúni Elttør gavst at spæla flogbólt afturi í 1998, tá hann var bert 18-ára gamal, og tá var hann á U-18 landsliðnum, og vann FM tað árið eisini við Meistaradeildini hjá Mjølni. Rúni minnist serliga spennandi og avgerandi dystin í Klaksvík móti Fleyr, ið fór at avgera meistaraheitið.

- Fleyr vóru á odda í landskappingini, og vunnu eisini fyrsta sett 15-9, og í øðrum setti vóru havnamenn á odda 9-0, men vit tóku time-out, og vendu gongdini. Vit vundu burtur úr teimum og vunnu annað sett 15-9, og somuleiðis triðja sett 15-9. Í fjórða setti vóru Fleyr fullkomuliga blástir um koll og vit knúskaðu teir av 15-0, og vunnu harvið meistaraheitið, sigur Rúni Elttør, ið tá valdi at gevast á toppinum, sum hann sjálvur tekur skemtandi til.

### Allir mans tøkir

Sum skilst, eru flest allir mans hjá Mjølni tøkir til dystin, og sambært Jóan Peturi á Stongum, verður teirra lið eisini fullmannað.

Mjølnir-leikararnir fara longu fríggjakvøldið suður til Havnar at royna umstøðurnar í høllini á Hálsi og serliga gólvið, sum bílagt er til finaluna.

Síðan fara teir, eins og sigur er hjá teimum, at gista í Havnini ta náttina.

Soleiðis gera sørvingar tó ikki. SÍ hópurin fer suður leygardagin, men áðrenn fráferð savnast teir í biohøllini í Sørvági, har teir eru saman við viðhaldsfólkum, og m.a. skriva autografar á serligar troyggju, ið iðhaldsfólkið kann fáa fyri bert 20,- kr.



*Eystein Elttør hevur í mong ár verið við til at mynda toppin av føroyskum flogbólti, og um vikuskiftið spæla teir sína sættu steypafinalu síðan aldarskiftið*



*Rúni Elttør, er kanska einamest kendur innan fótbóltsheimin, men eftir hervuliga krossbandsskaðan í fjør, er hugurin kyndur fyri flogbóltinum aftur. Rúni var ein av fremstu og evnaríkastu flogbóltsleikarunum í Føroyum, í endanum av 90-unum, men valdi at fara til skips í 1998. Tá var Rúni bert 18 ára gamal*

## Hóparnar til finaluna:

### SÍ

| Nr. Navn | Aldur | Hædd | Leikpláss | Landsdystir |
|---|---|---|---|---|
| 1 Finn Ingi Falkvard | 18 | 185 | Kant/Miðja | 0 Føroyar |
| 2 Bárður Venned | 19 | 187 | Miðja | 0 Føroyar |
| 3 Ólavur Jensen | 23 | 184 | Hevari | 5 Føroyar |
| 4 Hans Kári Hansen | 22 | 178 | Kant/Diag. | 0 Føroyar |
| 5 Jón Nielsen | 27 | 191 | Diagonal | 43 Føroyar |
| 6 Brandur Heinason | 18 | 183 | Libero | 8 Føroyar |
| 7 Ingi Ole Jacobsen | 19 | 186 | Miðja | 8 Føroyar |
| 8 Jóhan Petur á Stongum | 22 | 176 | Kant | 36 Føroyar |
| 9 Jón Joensen | 23 | 184 | Kant | 0 Føroyar |
| 10 Ragnar í Haraldstovu | 31 | 200 | Diag./Kant | 51 Føroyar |
| 11 Sonni Zachariasen | 18 | 170 | Hevari | 5 Føroyar |
| 12 Filipp Gram | 18 | 190 | Miðja | 5 Føroyar |

### Mjølnir

| Nr. Navn | Aldur | Hædd | Leikpláss | Landsdystir |
|---|---|---|---|---|
| 1 Rúni Elltør | 28 | 189 | Kant | 5 Føroyar |
| 2 Vladi Vassilev | 31 | 192 | Kant | 0 Bulgaria |
| 3 Gunnar Jørgensen | 19 | 184 | Kant | 5 Føroyar |
| 4 Bogi H. Isaksen | 32 | 183 | Hevari | 5 Føroyar |
| 5 Rasmus Purkhús | 19 | 186 | Kant | 0 Føroyar |
| 6 Thorvald Danielsen | 21 | 192 | Kant/Hevari | 8 Føroyar |
| 7 Karstin Joensen | 19 | 183 | Kant | 0 Føroyar |
| 8 Hanni Niclasen | 20 | 185 | Kant | 0 Føroyar |
| 9 Jón Syderbø | 20 | 185 | Miðja | 5 Føroyar |
| 10 Eystein Elltør | 33 | 184 | Libero | 5 Føroyar |
| 11 Hjalti Josephsen | 29 | 192 | Miðja | 9 Føroyar |
| 12 Bjarni Vágstún | 19 | 183 | Kant | 0 Føroyar |